# Gerðabók hjá Vestmanna Bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 30. oktoburbur 2024, kl. 17.00

**Bygdarráðslimir á fundi:** Bjørg á Rógvi, Sára Jógvansdóttir, Eyðun Hansen, Laila Haldansen, Anja Haldansen, Ingi Olsen og John Zachariassen
**Skrivari:** Rúna Koba

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri boðaði Pauli T. Petersen frá, at honum barst frá at møta á fundinum. 1. tiltakslimur John Zachariassen fekk fundarboð og játtaði at møta.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 308**
Umsókn um marknaumskipan millum matr.nr. 79a og 36h
104002-6-2024

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 22. oktobur 2024 umsókn um marknaumskipan ímillum matr.nr. 79a og matr.nr. 36h.

Nevndin mælir til at viðmæla umsóknini.

**Viðv. 308**
Tilmælið frá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt

**Mál 309**
Umsókn frá Búnaðarstovuni um sundurbýti av matr. nr. 143a.
J.nr.: 104002-5-2024

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi tann 22. oktobur 2024 umsókn frá Búnaðarstovuni um sundurbýti av matr. nr. 143a.

Nevndin mælir til at viðmæla umsóknini.

**Viðv. 309**
Tilmælið frá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt

**Mál 310**
Keyp av lendi omanfyri 205ca
J.nr.: 8202002-9-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 23. oktobur 2024 mál um keyp av lendi omanfyri matr.nr. 205ca.

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 22. oktobur 2024 umsókn um keyp av lendi omanfyri matr.nr. 205ca, Fjalsvegur 3.

Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti treytað av, at gøtuljóspelarnir kunnu standa har, teir standa í dag, og at einki verður gjørt við laðingarnar upp undir vegin.

Tilmælið frá Teknisku Nevnd varð einmælt samtykt.

Viðmerking: áðrenn bygdarráðsfundin tann 30. oktobur 2024 ringdi Bjarni Heinessen til Bjørg á Rógvi, borgarstjóra, og greiddi frá, at villa er komin í skránna hjá Bygdarráðnum. Umsóknin er til keyp av lendi omanfyri matr. nr. 205ca og ikki matr. nr. 205ce, sum lýst í skránni.

**Viðv. 310**
Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, viðmerkti, at fortreytirnar til viðgerð av málinum hava verði rættar, tí skeyt hon upp, at bygdarráðið viðgerð málið og at Bygdarráðið samtykkir tilmælið frá Teknisku Nevnd um keyp av lendið omanfyri matr. nr. 205ca.

Uppskotið hjá Bjørg á Rógvi, borgarstjóra, varð einmælt samtykt.

*Laila Haldansen fór av fundinum vegna ógegnið*

**Mál 311**
Søla av matr. nr. 300a
j. nr. 8202002-12-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 23. oktobur 2024 mál um sølu av matr. nr. 300a.
Umsitingin hjá Vestmanna kommunu bjóðaði 2. oktobur 2024 matr. nr. 300a út til sølu á heimasíðuni hjá kommununi.
Freistin fyri at lata inn tilboð varð sett til 23. oktobur 2024 kl. 12:00

Tá freistin var farin, vóru 3 tilboð komin inn:
1. Helgi Magnusssarson, kr. 105.000
2. Oyvildur Haldansen, kr. 50.000
3. Jákup Oluf í Skálum, kr. 150.521

Nevndin samtykti at mæla til at selja til hægsta boð, sum er frá Jákup Oluf í Skálum.

**Viðv. 311**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt

*Laila Haldansen varð aftur á fundinum*

**Mál 312**
Eykajáttan til Heimatænastuna í VEKS
J.nr.: 30102-1-2023

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 23. oktobur 2024 mál um eykajáttan til heimatænastuna í VEKS

Í telduposti dagf. 22. oktobur 2024 sendi Jógvan Kruse, stýrisformaður í Heimatænastuni í VEKS uppskot um eykafíggjarætlan fyri 2024
Fyri Vestmanna kommunu merkir hetta, at tørvur er á kr. 993.000.

Nevndin samtykti einmælt at mæla til at samtykkja eina eykajáttan á kr 993.000 og heita staðiliga á stýrið í heimatænastuni í VEKS at halda seg innanfyri givna játtan.

**Viðv. 312**
John Zachariassen skeyt upp at heita á umboð úr Vestmanna Bygdarráðið í stýrinum fyri Heimatænastuna í VEKS at kanna, um stýrið fyri Heimatænastuni í VEKS hevur tikið neyðug stig, til at rætta uppá mannagongdir fyri at fyribyrgja, at slík meirnýtsla hendir aftur.

Uppskotið hjá John Zachariassen varð einmælt samtykt.

Ingi Olsen skeyt upp at samtykkja eina eykajáttan á kr. 993.000 við 1. viðgerð.

Uppskotið hjá Inga Olsen varð einmælt samtykt.

**Mál 313**
Umraðfesting av upphæddum til verkætlanir, sum ikki verða framdar í ár – 2. viðgerð:
J.nr.: 30102-1-2023

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Maskinhøll | 1.200.000 kr |
| a. | Felagshølir til VÍF (fyrireikingararbeiði) | 500.000 kr |
| b. | Asfaltera tún og høvuðsgøtu í kirkjugarðinum á Knúgvum | 250.000 kr |
| c. | Taka grundina á Skálheyggi niður og slætta økið | 200.000 kr |
| d. | Sølutorg við bátahylin | 250.000 kr |
| 2. | Spillvatnsætlan Inni á Fjørð | 890.000 kr |
| a. | Kloakk í Útibø – framhald av kloakk í gøtu | 390.000 kr |
| b. | Fiskastykkið (meirnýtsla) | 172.000 kr |
| c. | Seyðahús Fjalshagi (meirnýtsla) | 63.550 kr |
| d. | Striking vegir (meirnýtsla) | 43.000 kr |
| e. | Asfalt av túninum og grava mold burtur við Faktorhúsini | 200.000 kr |
| f. | Seta ljós upp við minnisvarðan (ljósini eru komin, men arbeiðið manglar) | 20.000 kr |
| 3. | Gøta Bakkavegur-Bøgøta | Avlop 110.000 kr |
| a. | Kloakk í Útibø – framhald av kloakk í gøtu | 50.000 kr |
| b. | Dúk undir asfaltering av túni og høvuðsgøtu á Knúgvum | 50.000 kr |
| c. | Rekkverk Niðari Vegur (meirnýtsla) | 10.000 kr |

Bygdarráðið samtykti einmælt umraðfestingarnar við 1. viðgerð á eyka bygdarráðsfundi tann 16. oktobur 2024.

**Viðv. 313**
Bygdarráðið samtykti einmælt umraðfestingarnar við 2. viðgerð.

**Mál 314**
Leigugjøld fyri Ítróttarhøllina og hølir í Vestmanna skúla
J.nr.: 8216002-4-2024

Vestmanna bygdarráð samtykti á fundi tann 28. august 2024 mál um leigugjøld fyri leigu av Ítróttarhøllini og hølum í Vestmanna Skúla.

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið á fundi tann 23. oktobur 2024. Umsitingin hevur gjørt fíggjarnevndini varuga við, at leigugjøld í høllini og svimjihylinum ikki verða viðgjørd eins. Umsitingin vil við hesum gera vart við líkheitprinsippið, um ikki at gera mun á borgarum.

Fíggjarnevndin samtykti at beina málið fyri Bygdarráðið til støðutakan.

**Viðv. 314**
Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, skeyt upp, at øll skulu gjalda fyri privatleigu - umsitingin kann tó játta smærri stuðulsumsóknum.

Uppskotið hjá Bjørg á Rógvi, borgarstjóra, varð einmælt samtykt.

**Mál 315**
Val av nevndum og umboðum
J.nr.: 22042-1-2020

Vestmanna Bygdarráð viðgjørdi á fundi tann 30. mars 2023 mál um val av bygginevnd vegna umbygging av Vestmanna Skúla.

Av tí at fyrireikingararbeiðið er komið so væl ávegis, mælir Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, til at broyta byggininevndina frá at vera ein arbeiðsbólkur til eina politiska nevnd við avgerðarrætti og at manna nevndina við fylgjandi umboðum restina av valskeiðnum:

- Bjørg á Rógvi, borgarstjóri
- Sára Jógvansdóttir, varaborgarstjóri
- Laila Haldansen, forkvinna í Mentanarnevndini
- Anja Haldansen, forkvinna í Teknisku Nevnd
- Ingi Olsen, bygdarráðslimur
- Eyðun Hansen, bygdarráðslimur
- Umboð fyri leiðsluna í Vestmanna Skúla

Mælt verður eisini til, at Bygdarráðið letur bygginevndini avgerðarheimild.

**Viðv. 315**
Tilmælið hjá Bjørg á Rógvi, borgarstjóra, varð einmælt samtykt.

# Gerðabók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 30. oktobur 2024, kl. 17.00

**Mál 316**
Styrisskipan fyri Vestmanna kommunu.
J.nr.: 1002-7-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 18. septembur 2024 mál um styrisskipan fyri Vestmanna kommunu. Bjørg á Rógvi, borgarstóri, hevði skotið upp, at fíggjarnevndin arbeiðir við fylgjandi:

1. Tilmælið um at avtaka Trivnaðar- og Umhvørvisnevndina, og leggja trivnaðarpartin undir Mentanarnevndina, og umhvørvispartin undir Teknisku nevnd - við gildi frá 1. jan. 2025
2. Uppskot um at avtaka Havnanevndina, og leggja málsøkið undir Teknisku Nevnd - við gildi frá 1. jan. 2025
3. At varaborgarstjórin fær eina mánaðarløn sum svarar til (7-10%) av borgarstjóralønini - við gildi frá 1. jan. 2025.

Á fundinum skeyt Ingi Olsen upp at samtykkja punkt 1 og 2, men at strika punkt 3.

Uppskotið hjá Inga Olsen varð einmælt samtykt. Nevndin heitti á umsitingina at gera uppskot til nýggja stýrisskipan fyri Vestmanna kommunu klárt til ein av komandi fundunum hjá Fíggjarnevndini.

Fíggjarnevndin viðgjørdi uppskotið á fundi tann 23. oktobur 2024. Nevndin samtykti einmælt at mæla til at samtykkja uppskotið til nýggja stýrisskipan fyri Vestmanna Bygdarráð galdandi frá 1. januar 2025.

**Viðv. 316**
Sára Jógvansdóttir skeyt upp at fríðkan av kommununi verður flutt frá Teknisku Nevnd til Mentanarnevndina og at samtykkja skipanaruppskotið við nevndu broyting.

Uppskotið hjá Sáru Jógvansdóttir varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl 18:30

Sign.:

Bjørg á Rógvi Sára Jógvansdóttir Eyðun Hansen Laila Haldansen

Anja Haldansen Ingi Olsen John Zachariassen